


**Nr. 6** **17. mars 2013** **73. árg.**

# Getsemane

*Sál mín er sorgarbundin heilt til deyða. Mark. 14,34.*

Getsemanegátan er óloysilig, men ein hjálp er at hugsa um, at Jesus eisini hevur verið í myrkrinum. Ræðsla og ótti herjaðu á hann. Hvaðani stavar hesin óttin? Tá ið djevilin freistaði hann í oyðimørkini, vísti Jesus róligur og djarvur hansara lúnsku álopum frá sær. Ferð eftir ferð segði hann lærusveinunum frá, hvussu alt fór at enda. Hann visti, at nú var tímin komin, og at myrkrið ikki var tað, sum hevði størsta máttin. Og kortini kendi hann bæði ræðslu og ótta. Hví?

Ongin veit heilt rætta svarið. Hvussu skuldu vit kunna tað? Hann var offurlambið, sum bar alla heimsins synd. Og hvør hevur hóming av, hvat ið tað merkir? Álop hins ónda veksa nú til sítt sterkasta, nú ið avgerandi styrkisroyndin nærkast. ”Ert tú vísur í, at tað er rætt at halda á?” spyr freistarin. ”Og er tað neyðugt?”

Tá ið Jesus er freistaður á allan hátt eins og vit, hevur hann eisini merkt tað at kenna seg ótryggan. Hann gjørdist ikki bara sorgarbundin til deyða; hann var eisini lýðin til deyða og vann sigur. Hjá honum er hjálp, tá ið óttin herjar á okkum, meðan vit biðja: ”Verði vilji tín!”

”Verið her og vakið!” segði hann við lærusveinarnar; men teir orkaðu ikki at vekja; myrkrið tók teir á bóli. Orka vit at vekja? Vit koma ikki væl ígjøgnum Getsemane, um vit ikki læra at vekja. Fíggindin er snúðin og sterkur, og vit eru smá. Vak! Fyrst og fremst gloym ikki at takka honum, sum stríddist í Getsemane, og sum tí heilt og fult kann frelsa.

*Mín Jesus , eg ei gloyma kann,*
*tá eygað leit á teg,*
*tá ið eg sá teg sveitta blóð*
*har í Getsemane.*

*Tá ið eg hagar legði leið,*
*eg sá teg biðjandi,*
*eg sá tá mína synd og neyð*
*har í Getsemane.*

*Av øllum svikin har tú lást*
*og stríddi fyri meg,*
*eg aldri, aldri fata kann*
*ta neyð, tá gekk á teg.*

*Og sært tú kólna kærleik mín*
*til tín, mín Frelsari,*
*tú minn meg tá á kampin tín*
*har í Getsemani.*

---

# Jesus frelsir og brúkar eisini drápsmenn

Ludvig Karlsen

Stutt eftir, at vit vórðu frelst, fóru vit at halda møti. Vit settu eitt tjald upp mitt inni í Oslo, og har komu allir útiliggjararnir úr síðugøtunum í Oslo at lurta. Aftast sat ein kona, sum var serliga skrøpp. Helvtina av hárinum var rakað av høvdinum, og tú sást ein langan skurð eftir øllum skallanum, og stingini, har hon var seymað saman. Hon sat og órógvaði og rópti eftir mær: "Hygg hann, hann heldur seg vera so rættvísan og góðan!"

"Nei, tað er ikki so, tað hongur saman. Eg havi tikið ímóti náðini frá Gudi. "Av náði eru tit frelstir, við trúgv, og tað er ikki tykkum at takka, tað er Guds gáva." Ef. 2,8. Og henda náðin kann eisini falla tær í lut, um tú tekur ímóti Guds gávu, Jesusi."

Hon kom fram, og so segði hon frá øllum tí, hon hevði verið uppií, og tað var ikki fyri erkvisin oyru at hoyra. "So tú sært," endaði hon, "fyri mær er eingin náði."

"Jú, so sanniliga. Tí at skrivað stendur: Tí at av fylling hansara hava vit allir fingið, og tað náði oman á náði. - Tað er sum at síggja eina lagkøku við nógvum løgum, náði oman á náði, oman á náði. - Og víðari stendur, at lógin varð givin við Mósesi, men náði og sannleikin komu við Jesusi Kristi." Jóh. 1,16-17.

Hon varð frelst, og so spurdi hon, um vit kundu fara inn í fongslið at vitja beiggja sín, sum var drápsmaður. Vit játtaðu, og dagin eftir fóru eg og Herman Karlsen.

Men tað var ikki bara, bara. Hann var ein av grovastu og ráastu drápsmonnum í Noregi, og hann hevði fingið ein dóm upp á 18 ár. Í fleiri ár hevði hann sitið avbyrgdur.

Vit ringdu uppá, søgdu hvørjir vit vóru, og hvønn, ið vit skuldu vitja. So gjørdist kvirt eina góða løtu, og vit ivaðust í, um vit sluppu inn. Men so fór hurðin upp, og inn sluppu vit. Løtu seinni kom fangin út saman við einum vaktarmanni, ið sá ógvuliga bangin út. Herman og eg gjørdust eisini ræddir, tí maðurin sá garvillur og óstýriligur út, og hann var bæði stórur og bulmikil.

“Eg skal heilsa tær frá systur tíni. Hon bleiv frelst í gjár,” segði eg.

“Ha, systir míni? Er hon frelst?” spurdi hann bilsin.

So skumpaði vaktin okkum allar tríggjar inn í vitjanarrúmið og snaraði lykilin fyri á útsíðuni. So har sótu vit einsamallir við hesum vandamikla drápsmanni. “Tit eru teir fyrstu, ið vitja meg. Eingin hevur verið her í tvey og eitt hálvt ár. Eg havi sitið púra avbyrgdur, havi ikki havt nakað samband við hinar fangarnar. Tá ið eg fái mat, rættir vaktin hann inn gjøgnum eina lúku.” So fór hann at siga frá øllum, ið hann hevði verið uppií, og tað var ikki smávegis. Sjálvt vit øtaðust. Tað er ikki borðbært og kann ikki sigast frá einum talarastóli. “So tit síggja,” endaði hann, “fyri mær er eingin náði.”

Men tá kom Heilagi Andin yvir meg og segði: “Sig við hann, at eg frelsti drápsmannin Móses og brúkti hann stórliga í mínari tænastu.”

“Tú fert skeivur,” segði eg. “Gud hevur frelst drápsmenn fyrr og brúkt teir í síni tænastu, og tað sama ger hann enn.”

“Álvara?” spurdi hann undrandi.

“Ja, Móses drap ein egypta og jarðaði hann niður í sandin, og so spelaði hann avstað. Hann bøtti ikki so mikið sum ein dag í fangahúsi fyri hatta drápið. Men hann fekk eina oyðimarkarferð upp á 40 ár og mátti røkta seyð, til hann ein dagin møtti Jesusi, sum reisti hann upp og brúkti hann stórliga. Hann slapp at leiða alt Guds fólk úr Egyptalandi til Lovaða Landið.”

Hann man hava hoyrt bíbliusøgu sum barn, tí hann var skjótur at svara: “Ja, men hatta var í Gamla Testamenti.”

Tá kom Heilagi Andin aftur yvir meg og segði: “Sig við hann, at tað sama hendi í Nýggja Testamenti. Eg brúkti Saul.”

“Hatta var ikki bara galdandi í Gamla Testamenti, men eisini í Nýggja Testamenti. Saul var sekur í mongum morðum. Hann bant lærusveinar Harrans og førdi teir í leinkjum til høvuðsprestin, og hann var hjástaddur, tá ið Stefan varð steinaður. (Áps. 9., 6. & 7. kap.) Men so møtti Saul Jesusi á Damaskusvegnum, og so varð hann frelstur, og Gud brúkti hann stórliga. Hann man vera mætasti trúboðarin nakrantíð. Hann gjørdi fleiri prædikuferðir og skrivaði ein stóran part av Nýggja Testamenti, sum vit hava gagn av dagin í dag.”

Tá fall maðurin grátandi á knæ, og vit løgdu hendurnar á hann, og Herman og eg bóðu og bóðu fyri honum, og hann bleiv frelstur. Vit fordømdu hann ikki, tí Heilagi Andin sjálvur sannførir um synd. Vit skulu ikki fordøma nakran. Skriftin sigur: “So er tá nú eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi.” Róm. 8,1. - “Tí um onkur er í Kristi Jesusi, er hann nýggjur skapningur, hitt gamla er farið, sí, tað er vorðið nýtt!” 2. Kor. 5,17.

Ta fyrstu tíðina, eftir at vit vórðu frelst, kendi eg meg eisini fordømdan. Og tað er ikki so løgið. Eg hevði livað í 40 ár úti í alskyns synd, og nú sat eg í salinum saman við fólki, sum høvdu verið frelst í 50 ár. Tú kendi kanska kuldan frá summum teirra.

Vit mugu ongantíð fordøma ella peika eftir fólki. Tá tú knýtir nevan og peikar, so fer fremstifingur út móti næstanum, tummilin peikar upp móti Gudi, men tríggir fingrar peika inn móti tær sjálvum!

# Stillur fyri Harranum

*Ver tú fyri Harranum stillur.* *Sálmur 37,1.*

Tað er undursamt at síggja, hvussu ein stillur ljómi liggur yvir høvuðshendingunum í Jesu lívi. Veitst tú nakað stillari enn jólanáttina í Betlehem! Og so hin stilli ljómin, sum liggur yvir hendingini við ánna Jordan, tá ið Jóhannes Doyparin varð vígdur til gerning sín.

O, sum tað var stilt í kvøldmáltíðar-salinum í Jerusalem, tá ið Jesus stillisliga gekk um salin og tváðaði lærusveinunum um føturnar og gav teimum eitt fyridømi. Hin stilli ljómin á krossinum – páskamorgun – hvítusunnudag, til Andans dun brádliga fylti húsið, har teir sótu.

Guds fólk á hesi fold eru tey stillu í landinum. Lambið, sum skal verða borið, má liggja stilt á hirðans herðum. Silvurið, ið skal verða sligið, má liggja stilt í meistarans hond. Greinin, sum skal bera ávøkst, má vera still á bulinum, sum skal flyta henni føðslu.

Gud vælsigni teg at vera stillan fyri Harranunm í dag, og stillur kanst tú vera allan dagin, tó at tú arbeiðir yvir háls og herðar.

*t.* týddi.

---

Tá ið menniskju, sum hvør sær hava eitt dagligt lív í loynikamarinum, koma saman í flokk at biðja, skrykkir tað ógvisliga í andaverðina.

*e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 17. mars. | Tekstur: 2. Sám.11,2-5+14-17+26-27 ; 12,1-7a+9-13; | bíbliuorð: | 1. Jóh. 1,9 |
| 24. mars. | Tekstur: Matt. 26,33-35+69-75; | bíbliuorð: | 5. Mós.31,6c |
| 31. mars. | Tekstur: Matt. 28,1-15; | bíbliuorð: | Matt. 28,6b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74